LANDSPÍTALI
HÁSKÓLASJÚKRAHÚS

# Kunning til føroyskar sjúklingar, ið skulu til serviðgerð í Íslandi

## Vælkomin á Landspítalan

Starvsfólkið á Landspítalinum bjóðar tygum og avvarðandi tygara vælkomin.

Vit vilja, at tygum hava tað so gott sum gjørligt á sjúkrahúsinum.

Landspítalið er meginsjúkrahúsið í Íslandi við umleið 682 seingjarplássum. Landspítalið hevur umleið 4,500 starvsfólk og er tí størsta arbeiðsplássið í landinum. Landspítalið eisini frálæru sjúkrahús við høgum yrkisligum førleikum, ið veitir sjúklingum eina góða heilsutænastu á høgum stigi.

Landspítalið er á tveimum støðum í Reykjavík, við Hringbraut og í Fossvogi. Landspitalið við Hringbraut er mitt í Reykjavík, og tí er stutt til allar tænastur. Á Landspítalinum við Hringbraut verða gjørdar ymiskar viðgerðir, eitt nú bróstskurðviðgerðir, krabbameinsviðgerðir og stráluviðgerðir. Landspítalið í Fossvogi liggur eitt sindur longri frá. Har verða gjørdar allar æðraskurðviðgerðir. Til Landspítalið við Hringbraut eru bert 5 min. at koyra av flogvøllinum, meðan Landspítalið við Fossvogi eru 15 min. frá flogvøllinum.

Við Ármúla 9 í Reykjavík er sjúklingahotellið, (Park inn hotell), ið er ætlað føroyskum sjúklingum, sum skulu til serviðgerð í Íslandi, og teirra avvarðandi. Sjúklingahotellið er nætiendis Landspítalinum við Hringbraut og miðbýnum. Tað tekur uml. 30-40 min. til gongu. Bussar koyra næriendis sjúklingahotellinum til Landspítalið við Hringbraut og til Landspítalið í Fossvogi. Túrurin tekur uml. 20-30 min. Á sjúklingahotellinum starvast nakrir sjúkrarøktarfrøðingar, sum taka sær av sjúkrarøktini, eitt nú sárrøkt, hjálpa til við heilivági og við brúsubaði. Starvsfólkið á sjúklingahotellinum leggur seg eftir at gera umhvørvið so heimligt og hugnaligt sum gjørligt.

Við Landspítalið starvast ein føroyskur sjúklingavegleiðari, ið er bindiliður millum sjúklingin og viðgerðarstøðina á Landspítalinum. Sjúklingavegleiðarin hjálpir og vegleiðir sjúklingin og fylgjara, fer við til læknasamrøður, til kanningar og fer við sum tolkur. Nógv av starvsfólkunum hava lært ella arbeitt í hinum norðurlondunum, og tí, duga tey í stóran mun skandinaviskt mál. Leiðbeiningin er í forhøllini.

Um tygum hava spurningar, ella um okkurt er ógreitt, eru vit altíð til reiðar at greiða frá. Vit ynskja tygum og tygara avvarðandi alt tað besta.

Sí meira á føroysku heimasíðuni http://www.landspitali.is/pages/16619

Sjúklingavegleiðari Landspitalans:

Telefone: +354-8245495

Teldupostur: föroyatænastan@landsptali.is

## Kanning fyri MRSA

Allir sjúklingar, ið skula í viðgerð á Landspítalinum í Íslandi, skulu potast fyri eina bakteriu, ið hevur heitið MRSA, og sum eru stafylokokkar, ið hava mótstøðuføri fyri flestu antibiotikaum.

Tað er lítið hugsandi, at tygum hava hesa bakteriuna, men skuldi tað víst seg, er hon løtt at týna, men avleiðingin kann verða, at viðgerðin á Landspítalinum verður útsett nakað.

Fyri at tryggja, at Landsspítalið fær kanningarúrslitini í góðari tíð, heita vit á tygum um at fara til kommunulækna at verða potað/ur. Potingarnar verða gjørdar við vattpinnum í nasagluggunum, svølginum, aftanfyri kynsgøgnini og frá eksemi, um tygum hava tað. Er okkurt sár, verður potað frá tí eisini.

Kommunulæknarnir eru kunnaðir um mannagongdina, so tað er nóg mikið, at tygum upplýsa, at tygum skulu í viðgerð á Landspítalinum í Íslandi.

Eru tygum í ambulantari viðgerð, verða potingarnar gjørdar í ambulatoriinum.







LANDSPÍTALI
HÁSKÓLASJÚKRAHÚS